# Løgmansskrivstovan

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 09.08.2021 |
| Mál nr.: | 21/01380 |
| Málsviðgjørt: | NF |
| Ummælistíð: | 11.08-15.09 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð**
**um**
**starvsskipan fyri Føroya Kærustovn**

Við heimild í § 2, stk. 3 í løgtingslóg nr. xx frá xx.xx.2021 um Føroya Kærustovn verður ásett:

## Kapittul 1
## Virkisøki og ymisku málsøkini

**§ 1.** Føroya Kærustovnur er kærumyndugleiki fyri fyrisitingarligar avgerðir, tá ið tað er ásett í lóg, løgtingslóg ella við heimild í løgtingslóg. Harumframt tekur Føroya Kærustovnur avgerð í málum, tá ið tað er ásett í løgtingslóg.

**§ 2.** Føroya Kærustovnur er partur av almennu fyrisitingini. Løgtingslóg um fyrisitingarlóg, løgtingslóg um innlit í fyrisitingina og aðrar alment galdandi fyrisitingarreglur eru eisini galdandi fyri virksemið hjá Føroya Kærustovni.

**§ 3.** Tað er ókeypis at kæra til Føroya Kærustovn.

**§ 4.** Mál, sum sambært lóggávuni ikki kunnu viðgerast av Føroya Kærustovni, skulu so vítt til ber sendast víðari til rætta myndugleika, og parturin skal fáa fráboðan um hetta.

**§ 5.** Málsøki sum sambært galdandi lóggávu eru løgd til Føroya Kærustovn eru:
1) Almannamál, familjumál og heilsumál, sambært § 6.
2) Skattamál og avgjaldsmál, sambært § 7.
3) Lendismál, sambært § 8.
4) Lestrarstuðulsmál, sambært § 9.
5) Vinnumál, sambært § 10.
6) Psykiatrisk sjúklingamál, sambært § 11.
7) Skuldarumskipanarmál, sambært § 12.
8) Høvuðsbarnaverndarmál, sambært § 13.
9) Barsilsskipanarmál, sambært § 14.
10) Arbeiðsloysisskipanarmál, sambært § 15.
11) Tvingsilsmál, sambært § 16.

*Almannamál, familjumál og heilsumál*

**§ 6.** Almannamál, familjumál og heilsumál eru kærur um avgerðir, sum Almannaverkið, Heilsutrygd, Landsapotekarin, Hjálparráðsnevndin, Tilskotsnevndin, Sjúkrahúsverkið, Familjufyrisitingin, kommunurnar, Barnaverndarstovan og barnaverndartænasturnar hava tikið um ávís almannamál, familjumál og heilsuviðurskifti so sum:

1) Avgerðir hjá Almannaverkinum, t.d. um veitingar og tænastur.
2) Avgerðir hjá Sjúkrahúsverkinum, sum ikki eru um heilsufakligt virksemi, t.d. um fylgjara í samband við sjúkuviðgerð uttanlands.
3) Avgerðir hjá kommununum um barnatannrøkt og ungdómstannrøkt.
4) Avgerðir hjá Heilsutrygd, Landsapotekaranum, Hjálparráðsnevndini og tilskotsnevndini eftir løgtingslóg um almenna heilsutrygd.
5) Avgerðir eftir barnaverndarlógini, ið ikki kunnu leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina.
6) Avgerðir hjá kommununum eftir løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
7) Ávísar avgerðir hjá Familjufyrisitingini, t.d. um barnagjald og samveru.

*Stk. 2.* Serkøn ráðgeving í almannamálum, familjumálum og heilsumálum verður vanliga veitt av persónum, sum hava útbúgving sum:

1) lækni,
2) tannlækni,
3) sosialráðgevi, og
4) barnaserkøn.

*Stk. 3.* Í skjali 1 sæst yvirlit yvir lóggávu, sum er at rokna sum almannamál, familjumál og heilsumál.

*Skattamál og avgjaldsmál*

**§ 7.** Skattamál og avgjaldsmál eru kærur um avgerðir, ið TAKS, kommunalu skattakærunevndirnar og Toll- og skattaráð Føroya hava tikið um tollviðurskifti, skattaviðurskifti og avgjaldsviðurskifti. Eisini kærur um avgerðir, ið Akstovan hevur tikið um avgjøld við skráseting av akførum eru skattamál og avgjaldsmál.

*Stk. 2.* Serkøn ráðgeving í skattamálum og avgjaldsmálum verður vanliga veitt av persónum við serligum kunnleika til:

1) roknskaparviðurskifti,
2) fíggjarviðurskifti, og
3) arbeiðsmarknaðarviðurskifti.

*Stk. 3.* Í skjali 1 sæst yvirlit yvir lóggávu, sum er at rokna sum skattamál og avgjaldsmál.

*Lendismál*

**§ 8.** Lendismál eru kærur um avgerðir í sambandi við m.a. bygging, matrikulering, sundurbýti og tinglýsing.

*Stk. 2.* Lendismál fevna um kærur um:

1) Avgerðir hjá kommustýrunum eftir løgtingslóg um býarskipanir ella byggisamtyktir.
2) Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir løgtingslóg um tinglýsing og løgtingslóg um matrikulering og sundurbýti v.m.
3) Avgerðir hjá kommununum eftir Lov om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder, samt til offentlige Skoler på Færøerne.
4) Avgerðir eftir løgtingslóg um eigaraíbúðir.
5) Avgerðir eftir Byggilógini.

*Stk. 3.* Serkøn ráðgeving í lendismálum verður vanliga veitt av persónum, ið hava útbúgving sum:

1) byggikønur, og
2) landmálarakønur.

*Stk. 4.* Í skjali 1 sæst yvirlit yvir lóggávu, sum er at rokna sum lendismál.

*Lestrarstuðulsmál*

**§ 9.** Lestrarstuðulsmál eru kærur um avgerðir hjá Studna, t.d. um

útbúgvingarstuðul, ferðastuðul ella verkætlanarstuðul.
*Stk. 2.* Serkøn ráðgeving í lestrarstuðulsmálum verður vanliga veitt av persóni við serligum kunnleika sum lestrarvegleiðari.
*Stk. 3.* Í skjali 1 sæst yvirlit yvir lóggávu, sum er at rokna sum lestrarstuðulsmál.

*Vinnumál*

**§ 10.** Vinnumál eru kærur um avgerðir hjá Akstovuni, Arbeiðseftirlitinum, Umhvørvisstovuni, Fjarskiftiseftirlitinum, Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Kappingarráðnum, Landsverk, Posteftirlitinum, Skráseting Føroya, Sjóvinnustýrinum, Tryggingareftirlitinum sambært lóggávu nærri ásett í stk. 2.
*Stk. 2.* Vinnumál fevna um kærur um:
1) Avgerðir hjá Akstovuni eftir løgtingslóg um ferðslu, t.d. avgerðir um koyrikort.
2) Avgerðir hjá Arbeiðseftirlitinum eftir løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi.
3) Avgerðir hjá Umhvørvisstovan eftir løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni og kunngerð um vápnaprógv.
4) Avgerðir hjá Fjarskiftiseftirlitinum eftir løgtingslóg um fjarskifti.
5) Avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni eftir løgtingslóg um matvørur v.m., løgtingslóg um aling av fiski v.m., løgtingslóg um djórasjúkur, løgtingslóg um djóralæknavirksemi v.m. og løgtingslóg um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø.
6) Avgerðir hjá Kappingarráðnum eftir løgtingslóg um kapping.
7) Avgerðir hjá Landsverk eftir løgtingslóg um landsvegir og løgtingslóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál.
8) Avgerðir hjá Posteftirlitinum eftir løgtingslóg um postvirksemi.
9) Avgerðir hjá Skráseting Føroya eftir Vinnufelagalógini, Ársroknskaparlógini, Vinnufyritøkulógini, anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde, løgtingslóg um vinnu og Grannskoðaralógini.
10) Avgerðir hjá Sjóvinnustýrinum eftir kunngerð um loðsprógv og loðsfrítøkuskjal v.m.
11) Avgerðir hjá Tryggingareftirlitinum eftir løgtingslóg um tryggingarvirksemi.

*Stk. 2.* Harumframt viðger Føroya Kærustovnur kærur eftir løgtingslóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftinum.
*Stk. 3.* Serkøn ráðgeving í vinnumálum kann verða veitt av persónum, sum eru serkøn í:
1) ferðslu,
2) arbeiðsumhvørvi,
3) framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni,
4) fjarskifti,
5) postvirksemi,
6) djórasjúkum,
7) djóralæknavirksemi,
8) hald og innflutningi av vandamiklum djórum,
9) loðsvirksemi,
10) matvøruvirksemi,
11) aling,
12) kappingarvirksemi,
13) ognartøku,
14) lóggávu um landsvegir,
15) vinnufelagslóggávu,
16) ársroknskaparlóggávu,
17) grannskoðanarvirksemi,
18) tryggingarvirksemi,
19) arbeiðsmarknaðarviðurskiftum
20) vápnum, og
21) sálarfrøði.

*Stk. 4.* Í skjali 1 sæst yvirlit yvir lóggávu, sum er at rokna sum vinnumál.

*Psykiatrisk sjúklingamál*

**§ 11.** Psykiatrisk sjúklingamál eru kærur um avgerð hjá yvirlækna at brúka tvingsli í sambandi við innlegging á psykiatrisku

deild. Um persónur í sambandi við innlegging á psykiatrisku deild er fyri tvingsli, sum t.d. tvingsilsafturhald, tvingsilsviðgerð ella fastspenning, so kann kæra latast Føroya Kærustovni.
*Stk. 2.* Psykiatrisk sjúklingamál fevna um kærur um fylgjandi tvingsilsinntriv:
1) Tvingsilsinnlegging.
2) Tvingsilsafturhald.
3) Afturføring.
4) Tvingsilsviðgerð.
5) Fastspenning.
6) Nýtslu av likamligum valdi.
7) Nýtslu av persónligum ávaringarskipanum, peiliskipanum og serligum hurðalásum.
8) Verjufastspenning.
9) Persónlig vernd, ið uttan steðg varar meira enn 24 tímar og hurðalæsing á deildini.
10) Tvungna uppfylging eftir útskriving.
*Stk. 3.* Serkøn ráðgeving í Psykiatrisk sjúklingamál verður veitt av persóni sum:
1) er lækni, og
2) persóni sum hevur innlit í brekøkið, sbr. § 17, stk. 2.
*Stk. 4.* Tey serkønu eru við at taka avgerð í psykiatriskum sjúklingamálum saman við Føroya Kærustovni.
*Stk. 5.* Í skjali 1 sæst yvirlit yvir lóggávu, sum er at rokna sum psykiatrisk sjúklingamál.

*Skuldarumskipanarmál*

**§ 12.** Skuldarumskipanarmál eru mál um at umskipa skuld, ið persónar hava til landskassan. Føroya Kærustovnur kann heilt ella lutvíst eftirgeva ella umskipa skuldina. Lýkur umsøkjarin ikki treytirnar fyri umskipan, kann talan vera um at veita gjaldskáa.
*Stk. 2.* Tað er bert niðanfyri nevnda skuld, ið Føroya Kærustovnur kann umskipa:
1) Landsskattur og AM-gjald.
2) Meirvirðisgjald.
3) Tollur.
4) Lønarhæddaravgjald.
5) Framleiðslugjald.
6) Vinnulán og veðhald givin av Føroya Landsstýri.
7) Lestrarlán frá Studna.
8) Rentuskuld og skuld frá øðrum útreiðslum, ið eru knýttar at høvuðsskuldini.
*Stk. 3.* Serkøn ráðgeving í skuldarumskipanarmálum verður vanliga veitt av persónum, ið eru:
1) roknskaparkøn,
2) fyrisitingarkøn,
3) køn í bankavirksemi, og
4) vinnulívskøn.
*Stk. 4.* Í skjali 1 sæst yvirlit yvir lóggávu, sum er at rokna sum skuldarumskipanarmál.

*Høvuðsbarnaverndarmál*

**§ 13.** Høvuðsbarnaverndarmál eru mál grundaði á tilmæli frá barnaverndartænastunum kring landið.
*Stk. 2.* Høvuðsbarnaverndarmál fevnir um fylgjandi mál:
1) Umsorganaryvirtøku.
2) Samverurætt.
3) Familjuviðgerð á stovnum hjá landinum.
4) Dagtilboð og samdøgurstilboð á stovnum hjá landinum, har samtykki ikki er fingið frá foreldramyndugleikanum ella barni yvir 15 ár.
5) Rættin til ókeypis umboðan í omanfyrinevndu málum.
*Stk. 3.* Serkøn ráðgeving í Høvuðsbarnaverndarmál verður veitt av persóni sum er:
1) sálarfrøðingur, og
2) barnaserkønur, t.d. heilsufrøðingur ella námsfrøðingur.
*Stk. 4.* Tey serkønu eru við at taka avgerð í Høvuðsbarnaverndarmál saman við Føroya Kærustovni.
*Stk. 5.* Í skjali 1 sæst yvirlit yvir lóggávu, sum er at rokna sum høvuðsbarnaverndarmál.

*Barsilsskipanarmál*

**§ 14.** Barsilsskipanarmál eru kærur um avgerðir, sum TAKS tekur við heimild í løgtingslógini um barsilsskipan. Talan kann t.d. vera um avgerð um útgjald úr Barsilsskipanini, avgerð um útrokningargrundarlagið á barsilsgjaldinum, avgerð um frítøku at rinda til Barsilsskipanina ella aðrar avgerðir hjá TAKS tiknar við heimild í løgtingslógini um barsilsskipan.
*Stk. 2.* Serkøn ráðgeving í barsilsskipanarmálum verður veitt av persónum við serligum kunnleika um arbeiðsmarknaðarmál, ein umboðandi løntakarar og ein umboðandi arbeiðsgevarar.
*Stk. 3.* Í skjali 1 sæst yvirlit yvir lóggávu, sum er at rokna sum barsilsskipanarsmál.

*Arbeiðsloysisskipanarmál*

**§ 15.** Arbeiðsloysisskipanarmál eru kærur um avgerðir, ið Arbeiðsloysisskipanin tekur við heimild í ALS-lógini. Talan kann t.d. vera um avgerð hjá Arbeiðsloysisskipanini um afturgjald av ov nógv útgoldnum arbeiðsloysisstuðli, avgerð um karantenu í Arbeiðsloysisskipanini, avgerð í sambandi við feriu í Arbeiðsloysisskipanini ella aðrar avgerðir hjá Arbeiðsloysisskipanini tiknar við heimild í ALS-lógini.
*Stk. 2.* Serkøn ráðgeving í arbeiðsloysisskipanarmálum verður veitt av persónum við serligum kunnleika til arbeiðsmarknaðarmál, ein umboðandi løntakarar og ein umboðandi arbeiðsgevarar, sbr. § 17, stk. 3.
*Stk. 3.* Tey serkønu eru við at taka avgerð í arbeiðsloysisskipanarmálum saman við Føroya Kærustovni.
*Stk. 4.* Í skjali 1 sæst yvirlit yvir lóggávu, sum er at rokna sum arbeiðsloysisskipanarmál.

*Tvingsilsmál*

**§ 16.** Tvingsilsmál fevna um góðkenning av tilmælum frá Almannaverkinum og kommununum um tvingsilsinntriv og um viðgerð av kærum um framd tvingsilsinntriv og ávísar avgerðir hjá myndugleikunum.
*Stk. 2.* Í tvingsilsmálum verða fylgjandi tilmæli viðgjørd:
1) Flyting uttan samtykki.
2) Ávaringarskipan og peilingarskipan.
3) Serlig upplatingarskipan til úthurð.
4) Halda persóni aftur og føra hann aftur.
5) Halda persóni føtum í sambandi við reinføri o.a.
6) Nýtsla av hjálparráði.
7) Forða fyri atgongd til og eftirlit við nýtslu av internet og telefon.
8) Kanning av býli og ognarlutum.
9) Leggja hald á ognarlutir.
10) Læsa býli um náttina.
*Stk. 3.* Serkøn ráðgeving í tvingsilsmálum verður veitt av persóni sum er:
1) sálarfrøðingur,
2) sjúkrarøktarfrøðingur,
3) heilsufrøðingur,
4) námsfrøðingur,
5) serlækni í psykiatri, og
6) heilsurøktari.
*Stk. 4.* Tey serkønu eru við at taka avgerð í tvingsilsmálum saman við Føroya Kærustovni.
*Stk. 5.* Í skjali 1 sæst yvirlit yvir lóggávu, sum er at rokna sum tvingsilsmál.

## Kapittul 2
## Serkøn ráðgeving o.a.

**§ 17.** Er ikki annað ásett verða tey serkønu tilnevnd av Føroya Kærustovni, so vítt tað ber til eftir tilmæli frá avvarandi yrkisfelag, og fyri eitt 3 ára tíðarskeið í senn.
*Stk. 2.* Í psykiatriskum málum sambært § 10 verður serkønur við innliti í brekøkið tilnevndur eftir tilmæli frá Megd.
*Stk. 3.* Í arbeiðsloysisskipanarmál sambært § 14 verður serkønur umboðandi løntakarar tilnevndur eftir tilmæli frá Arbeiðsloysisskipanini, og serkønur umboðandi arbeiðsgevarar tilnevndur eftir tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag.

**§ 18.** Yvirlit yvir serkøn verður lagt á heimasíðuna hjá Føroya Kærustovni. Føroya Kærustovnur kann eisini tilnevna onnur serkøn ella leita sær serkøna hjálp frá onkrum, sum ikki stendur í yvirlitinum, t.d. um ógegni ger, at tey á serkønu á yvirlitinum ikki kunnu vera við í ítøkuligu viðgerðini.
*Stk. 2.* Føroya Kærustovnur endurskoðar hvørt triðja ár yvirlitið yvir serkøn.

**§ 19.** Tey serkønu verða knýtt at Føroya Kærustovni og ikki teimum einstøku økjunum, og kunnu soleiðis nýtast til øll sløg av málum, um tað verður mett gagnligt ella neyðugt.

**§ 20.** Serkøn, sum ikki eru starvssett í Føroya Kærustovni, hava í sínum virksemi fyri Føroya Kærustovn somu tagnarskyldu sum almenn starvsfólk sambært § 26 í løgtingslóg um fyrisitingarlóg.

## Kapittul 3
## Setan av Føroya Kærustovni

*Avgerð við trimum løgfrøðingum*

**§ 21.** Føroya Kærustovnur verður settur við stjóranum og tveimum løgfrøðingum. Stjórin kann lata sína heimild til annan royndan løgfrøðing á Føroya Kærustovni.
*Stk. 2.* Tá ið avgerð skal takast av Føroya Kærustovni er útgangsstøðið, at avgerðin verður tikin av trimum løgfrøðingum í felag. Ein av løgfrøðingunum skrivar upprit við tilmæli um avgerð, sum verður latið hinum báðum løgfrøðingunum.
*Stk. 3.* Uppritið skal latast hinum í avgerðarbólkinum í somikið góðari tíð, at tey hava í minsta lagi tríggjar gerandisdagar at gjøgnumganga uppritið, áðrenn fundur verður hildin um málið.

**§ 22.** Í serligum førum, eitt nú tá ið talan er um mál, sum ikki kunnu bíða, t.d. um steðgandi virknað, kann uppritið vera latið hinum løgfrøðingunum sama dag, sum avgerð verður tikin.
*Stk. 2.* Somuleiðis kunnu háttalagsspurningar so sum gegnisspurningar, partsspurningar, kærurætt o.a. viðgerast, uttan at hinir løgfrøðingarnir í avgerðarbólkinum hava fingið tríggjar gerandisdagar til fyrireiking.

**§ 23.** Uppritið verður viðgjørt á fundi og verður uppritið mett at vera nóg gott grundarlag at taka avgerð á, verður avgerð tikin við vanligum atkvøðumeiriluta.

**§ 24.** Er okkurt ivamál, okkurt sum skal kannast nærri, verður málið útsett til nærri kanning og løgfrøðingurin, sum hevur gjørt upprunauppritið, kannar ivaspurningarnar og ger nýtt upprit ella ískoyti til uppritið. Tá hetta er liðugt, verður nýggjur fundur ásettur.

*Avgerð við fimm løgfrøðingum*

**§ 25.** Í serligum førum kann stjórin avgera, at Føroya Kærustovnur verður settur við stjóranum og fýra løgfrøðingum.
*Stk. 2.* Tað er ein ítøkilig avgerð, nær mett verður, at eitt mál skal viðgerast av fimm ístaðin fyri trimum løgfrøðingum. Tá ið talan er um serliga prinsipiel mál, eigur ein breiðari hópur at vera við í viðgerðini.
*Stk. 3.* Er talan um mál innan eitt øki, har tey serkøna altíð eru við at taka avgerð, eru tey serkønu eisini við at taka avgerð saman við teimum fimm løgfrøðingunum.
*Stk. 4.* Reglurnar í § 27 verða í øðrum førum enn ásett í stk. 3 brúktar á sama hátt viðvíkjandi spurninginum um serkøn skulu vera við í viðgerðini.

*Avgerðir við serkønum*

**§ 26.** Leikluturin hjá teimum serkønu er sum útgangsstøðið at veita ráðgeving til løgfrøðingarnar á Føroya Kærustovni í sambandi við fyrireikingina av einstøkum málum.

**§ 27.** Í málum, har serligur serkunnleiki verður mettur neyðugur fyri viðgerðina, kann Føroya Kærustovnur verða settur við

stjóranum og einum ella tveimum løgfrøðingum umframt einum ella tveimum viðkomandi serkønum.

**§ 28.** Er einki ásett í løgtingslóg ella kunngerð um, at serkøn skulu vera partur av avgerðarmyndugleikanum, er útgangsstøðið, at Føroya Kærustovnur verður settur við løgfrøðingum á Føroya Kærustovni.

**§ 29.** Avgerðir um kærufreist, avgerðarheimild, uppafturtøku, partsstøðu og steðgandi virknað verða sum meginregla tiknar av Føroya Kærustovni, men tey kunnu serkønu vera biðin um at veita ráðgeving í tann mun tað verður mett gagnligt ella neyðugt.

*Stjórin tekur avgerð*

**§ 30.** Stjórin kann taka avgerð um steðgandi virknað, tá slík avgerð ikki tolir at bíða. Stjórin kann eisini taka avgerð um uppafturtøku, kærufreist, avgerðarheimild og partstatus.
*Stk. 2.* Stjórin kann heimilað øðrum løgfrøðingi á stovninum taka avgerðir sambært stk. 1.
*Stk. 3.* Stjórin avger, um mál skulu viðgerast eftir §§ 21, 25 og 27, og hvør mannar Føroya Kærustovn í einstøku málunum. Stjórin kann avgera, at mál, sum byrjað sum vanlig viðgerð eftir § 21, skal flytast til viðgerð sambært §§ 25 ella 27.

*Innanhýsis val og samanseting av Føroya Kærustovni í einkultu málunum*

**§ 31.** Allir løgfrøðingar á Føroya Kærustovni kunnu viðgera ella vera við í viðgerðini av øllum sløgum av málum, sum Føroya Kærustovnur viðgerð.
*Stk. 2.* Fyri at menna serkunnleika og hava samanhang í avgerðunum, býtir stjórin málsøkini millum løgfrøðingarnar og um til ber soleiðis, at tað altíð er meira enn ein løgfrøðingur, sum hevur innlit í eitt fakøki.

**§ 32.** Tá mál koma inn, ella í seinasta lagi, tá upprit er skrivað, avger stjórin hvør skal mannað Føroya Kærustovn í einstaka málinum.

**§ 33.** Tá ið Føroya Kærustovnur verður settur, er stjórin fastur limur, umframt tann løgfrøðingurin, sum hevur skrivað uppritið. Stjórin kann lata annan royndan løgfrøðing á Føroya Kærustovni taka sæti í avgerðarbólkinum sína vegna. Ein triðji løgfrøðingur verður valdur at taka sæti í Føroya Kærustovni.
*Stk. 2.* Umframt tann løgfrøðingin, sum hevur skrivað uppritið, skal ein royndur løgfrøðingur vera við, tá ið Føroya Kærustovnur verður settur. Er løgfrøðingurin, sum hevur skrivað uppritið, royndur løgfrøðingur, er tað ikki neyðugt, at hinir løgfrøðingarnar eru royndir.

## Kapittul 4
## Avgerðarmannagongdin

*Fyrireiking av málum*

**§ 34.** Tá mál er innkomið til Føroya Kærustovn, sær Føroya Kærustovnur til, at málið verður upplýst soleiðis, at tað er klárt til støðutakan.

*Kærumál*

**§ 35.** Innkomin kæra verður send til myndugleikan sum hevur tikið avgerð, og biðið verður um ummæli og allar upplýsingar, sum hava verið grundarlag undir avgerðini.
*Stk. 2.* Um ummæli hevur við sær viðmerkingar ella nýggj skjøl, verða tey send myndugleikanum, ávikavist kæraranum, til viðmerkingar. Føroya Kærustovnur kann áseta eina hóskandi freist fyri, nær umbidnu upplýsingarnar skulu verða Føroya Kærustovni í hendi.
*Stk. 3.* Føroya Kærustovnur kann eisini fáa til vega upplýsingar frá øðrum, um hetta verður mett neyðugt.

*Stk. 4.* Tá mett verður, at teir upplýsingar, sum skulu til fyri at gera eina lýsing av málinum, eru innkomnar, ger Føroya Kærustovnur eitt upprit við tilmæli um avgerð.

*Viðgerð av øðrum málum*

**§ 36.** Í øðrum avgerðarmálum skal Føroya Kærustovnur tryggja, at allir neyðugir upplýsingar verða fingnir til vega frá viðkomandi myndugleikum o.ø., so haldgott grundarlag er at taka støðu til málið.

*Serligar málviðgerðarreglur*

**§ 37.** Eru serligar ásetingar um málsgongd innan ávíst øki ásettar í lóg, løgtingslóg ella kunngerð, eru tær galdandi fram um málsviðgerarreglurnar í hesi kunngerð.

*Skrivlig viðgerð og rætt at møta*

**§ 38**. Viðgerðin hjá Føroya Kærustovni er skrivlig.
*Stk. 2.* Kærarin og tann myndugleiki, ið hevur tikið ta innkærdu avgerðina, hava møguleika at møta á fundi við Føroya Kærustovn, og fáa høvi at bera fram áskoðan sína munnliga fyri settað Føroya Kærustovn.
*Stk. 3.* Føroya Kærustovnur vegleiðir kæraran um henda rætt.

**§ 39.** Um mál er greitt til viðgerð, men av kærarans ella umsøkjarans ávum dregur óneyðugt út, kann Føroya Kærustovnur fremja málið, uttan at kærarin ella umsøkjarin møtir.

*Tilnevning av løgfrøðingum og serkønum*

**§ 40.** Stjórin tilnevnir løgfrøðingar og møgulig serkøn, sum skulu viðgera og taka avgerð í málinum. Stjórin avger eisini, hvør skal leiða fundin.

*Avgerðarfundir*

**§ 41.** Føroya Kærustovnur tekur avgerð á fundi.
*Stk. 2.* Um kærarin hevur sagt frá, at hann ynskir at møta, verður hann innkallaður til fund í minsta lagi 2 vikur frammanundan, at fundurin ætlandi skal verða hildin. Samstundis verður viðkomandi myndugleiki innkallaður. Kærarin kann, nær tað skal verða, boða frá, at hann afturkallar ynskið um at møta.
*Stk. 3.* Um kærarin ikki møtir á fundinum, verður málið viðgjørt, um ikki serlig viðurskifti gera seg galdandi.

**§ 42.** Stjórin ella ein royndur løgfrøðingur, sum stjórin hevur tilnevnt at leiða fundin, leggur málið fram á fundinum. Um kærarin er møttur, fær hann høvi at greiða frá sínum sjónarmiðum og grundgevingum. Somuleiðis fær myndugleikin sum hevur tikið kærdu avgerðina høvi til at bera sína áskoðan fram fyri settað Føroya Kærustovni.
*Stk. 2.* Løgfrøðingarnir og serkøn kunnu seta spurningar til kæraran og myndugleikan.
*Stk. 3.* Tá ið kærarin og myndugleikin eru farin av fundinum aftur, viðger Føroya Kærustovnur málið og tekur støðu til tað.
*Stk. 4.* Avgerðin hjá settað Føroya Kærustovni kann verða at staðfesta, broyta, partvís broyta ella heimvísa avgerðina. Eisini kann verða avgjørt at útseta málið til nærri kanningar, um t.d. upplýsingar ella frágreiðingar, sum komu fram á fundinum, geva høvi til tess.

**§ 43.** Fundirnir eru ikki almennir, og ljóðupptøka av fundinum má heldur ikki gerast.

**§ 44.** Avgerðirnar verða tiknar við vanligum meiriluta. Uppskot verður roknað sum samtykt uttan atkvøðugreiðslu, tá ið stjórin heldur tað ikki vera neyðugt at atkvøða, og ongin løgfrøðingur ella serkønur krevur atkvøðugreiðslu.

**§ 45.** Reglurnar í §§ 41-44 verða brúktar á sama hátt viðvíkjandi avgerð av øðrum málum enn kærur, sbr. § 36.

*Fundarbók*

**§ 46.** Fundarbók verður førd av Føroya Kærustovni og góðkend av stjóranum. Í fundarbókini skal verða upplýst, hvønn dag fundur er, og nær fundurin byrjar og endar, hvørji mál verða viðgjørd á fundinum við neyðugum frámerki, hvør avgerð er tikin, og hvør var til staðar á fundinum.

**§ 47.** Er ikki full semja um avgerðir hjá settað Føroya Kærustovni í einum máli, skulu tey, ið eru komin til aðra niðurstøðu í málinum, hava loyvi til at fáa sína støðu skrivaða í fundarbókina, tá ið biðið verður um tað.

**§ 48.** Um onkur í settað Føroya Kærustovni verður mettur at vera ógegnigur sambært løgtingslóg um fyrisitingarlóg, og tí ikki sleppur at luttaka í viðgerðini og endaligu avgerðini av einum máli, skal hetta skrivast í fundarbókina. Tann, ið er mettur ógegnigur, kann, um hann mótmælir avgerðina, krevja at fáa sítt mótmæli móti avgerðini hjá settað Føroya Kærustovni um sítt ógegni skrivað í fundarbókina.

**§ 49.** Tá fundurin er lokin, skal fundarbókin undirskrivast av øllum luttakandi løgfrøðingunum og møguligum serkønum á fundinum. Eingin kann við at vísa sína serstøðu í einum máli sýta fyri at undirskriva fundarbókina.

## Kapittul 5
## Setan av løgfrøðingum á Føroya Kærustovni

**§ 50.** Løgfrøðingarnir á Føroya Kærustovni skulu hava løgfrøðiligt embætisprógv ella eina aðra samsvarandi útbúgving.
*Stk. 2.* Tað er ein treyt fyri at vera settur í starv sum løgfrøðingur á Føroya Kærustovni, at viðkomandi hevur ein bachelor í løgfrøði, umframt ein master í løgfrøði.
*Stk. 3.* Aðrar samsvarandi útbúgvingar skulu vera sambæriligar við donsku løgfrøðiligu embætisútbúgvingina.

## Kapittul 6
## Setan av bráðfeingisstjóra um stjórin á Føroya Kærustovni er ógegnigur

**§ 51.** Er stjórin ógegningur í einum máli, verður ein bráðfeingisstjóri tilnevndur í málinum. Bráðfeingisstjórin skal vera løgfrøðingur og vera kønur í fyrisitingarrætti.
*Stk. 2.* Sum bráðfeingisstjóri kann tilnevnast:
1) løgfrøðingur á søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetur Føroya,
2) deildarstjórin ella løgfrøðingur á lógartænastuni á Løgmansskrivstovuni, ella
3) annar royndur fyrisitingarkønur løgfrøðingur.

*Stk. 3.* Føroya Kærustovnur ger eitt yvirlit yvir møguligar bráðfeingisstjórar, so hesir eru tøkir, tá ið neyðugt er við bráðfeingisstjóra.
*Stk. 4.* Viðkomandi løgfrøðingar á Føroya Kærustovni fyrireika málið saman við møguligum serkønum, og bráðfeingisstjórin tekur avgerð saman við løgfrøðingunum og serkønum.

## Kapittul 7
## Gildiskoma og skiftisreglur

**§ 52.** Henda kunngerð kemur í 1. januar 2022.
*Stk. 2.* Inntil allar kærunevndir og nevndir sambært § 15 í løgtingslógini eru tiknar av, virkar Føroya Kærustovnur í skiftistíðarskeiðnum til 1. januar 2024 sum skrivstova hjá hesum kærunevndum og

nevndum sambært higartil galdandi reglum.

Løgmansskrivstovan, dagfesting

**Bárður á Steig Nielsen**
løgmaður

/ John Rajani

**Skjal 1**

## Yvirlit yvir lóggáva á ymisku málsøkjunum

1. **Yvirlit yvir lóggávu, sum er at rokna sum almannamál, familjumál og heilsumál, sbr. § 6, stk. 3.**
   1.1. Løgtingslóg um almannatrygd og tænastur.
   1.2. Løgtingslóg um stuðul til uppihaldspening.
   1.3. Løgtingslóg um sjúkrahúsverkið.
   1.4. Løgtingslóg um barna- og ungdómstannrøkt.
   1.5. Løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.
   1.6. Løgtingslóg um almannapensjónir o.a.
   1.7. Løgtingslóg um barnavernd (Barnaverndarlógin), tó ikki avgerðir hjá Høvuðsbarnaverndini.
   1.8. Løgtingslóg um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima.
   1.9. Løgtingslóg um uppihald á stovni o.l.
   1.10. Løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl.
   1.11. Løgtingslóg um viðbóttil ávísar pensiónistar v.fl.
   1.12. Løgtingslóg um ættleiðingarstuðul.
   1.13. Løgtingslóg um heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin).
   1.14. Løgtingslóg um ættleiðing (Ættleiðingarlógin).
   1.15. Lov om Ægteskabets Retsvirkninger.
   1.16. Lov om Bevarelse af Enkepensionsret ved Separation og Skilsmisse.
   1.17. Lov om borteblevne.
   1.18. Lov om børns retsstilling.
   1.19. Lov om inddrivelse af underholdsbidrag.
   1.20. Arveloven.
   1.21. Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ægteskabs indgåelse og opløsning.
   1.22. Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forældremyndighed og samvær.
   1.23. Anordning om ikrafttræden for Færøerne af værgemålsloven, sambært § 51 a.

2. **Yvirlit yvir lóggávu, sum er at rokna sum skattamál og avgjaldsmál, sbr. § 7, stk. 3.**
   2.1. Løgtingslóg um Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.
   2.2. Løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin).
   2.3. Løgtingslóg um tíðaravmarkað avgjald á ferðandi við komu til Føroyar.
   2.4. Løgtingslóg um skattligar avskrivingar v.m. (Avskrivingarlógin).
   2.5. Løgtingslóg Løgtingslóg um bókhald (Bókhaldslógin).
   2.6. Løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju.
   2.7. Løgtingslóg um gjald av vinningi við burturluting v.m.
   2.8. Løgtingslóg um stuðul til dupult húsarhald.
   2.9. Løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin).
   2.10. Løgtingslóg um eydnuspæl v.m.
   2.11. Løgtingslóg um ferðagjald.
   2.12. Løgtingslóg um stuðul til ferðaútreiðslur.

2.13. Løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi.
2.14. Løgtingslóg um frítíð við løn.
2.15. Løgtingslóg um íløgugrunnar.
2.16. Midlertidig bestemmelse for Færøerne om Inddrivelse af personlig skat til amtskommunen.
2.17. Lov om Inddrivelse af Skatter og Afgifter til det Offentlige m.m.
2.18. Løgtingslóg um gjøld o.l. fyri innkrevjing av falnari skuld til landskassan.
2.19. Løgtingslóg um skatting av kapitalvinningi (Kapitalvinningsskattalógin).
2.20. Løgtingslóg um álíkning, innkrevjing, eftirlit o.a. í sambandi við skatting av inntøku av kolvetnisvirksemi (Kolvetnisskattafyrisitingarlógin).
2.21. Løgtingslóg at skatta inntøkur av kolvetnisvirksemi (Kolvetnisskattalógin).
2.22. Løgtingslóg um lønarhæddaravgjald.
2.23. Lov om Forældelse af visse Fordringer.
2.24. Løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu.
2.25. Løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin).
2.26. Løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum.
2.27. Løgtingslóg um panting fyri skatt.
2.28. Løgtingslóg um avgjøld í samband við panting.
2.29. Løgtingslóg um skatt av rentutryggingum v.m.
2.30. Løgtingslóg um stuðul til rentuútreiðslur av lánum.
2.31. Løgtingslóg um skattafría samanlegging o.a.
2.32. Løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin).
2.33. Løgtingslóg um skatting av vinningi frá sølu av veiðirættindum.
2.34. Løgtingslóg um umhvørvisgjald á smyrjiolju.
2.35. Løgtingslóg um Toll- og Skattafyrisiting.
2.36. Løgtingslóg um toll.
2.37. Løgtingslóg um skatt av reiðarívirksemi (Tonsaskattalógin).
2.38. Løgtingslóg um at veita trygd og at bjóða á tvingsilssølu í samband við innkrevjingarmál.
2.39. Lov for Færøerne om Udpanting m.m.
2.40. Løgtingslóg um umskipan av persónliga riknum vinnuvirki til partafelag.
2.41. Løgtingslóg um skráseting av útflutningi av vørum.

**3. Yvirlit yvir lóggávu, sum er at rokna sum lendismál, sbr. § 8, stk. 4.**

3.1. Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir.
3.2. Løgtingslóg um matrikulering og sundurbýti v.m.
3.3. Løgtingslóg um tinglýsing.
3.4. Lov om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder, samt til offentlige Skoler på Færøerne.
3.5. Løgtingslóg um eigaraíbúðir.
3.6. Løgtingslóg um at byggja bygningar o.a. (Byggilógin).
3.7. Løgtingslóg um tinglýsingaravgjald.
3.8. Løgtingslóg um tinglýsingargjøld v.m.

**4. Yvirlit yvir lóggávu, sum er at rokna sum lestrarstuðulsmál, sbr. § 9, stk. 3.**

4.1. Løgtingslóg um lestrarstuðul.

**5. Yvirlit yvir lóggávu, sum er at rokna sum vinnumál, sbr. § 10, stk. 4.**

5.1. Løgtingslóg um ferðslu.
5.2. Løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi.
5.3. Løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (Elveitingarlógin).
5.4. Løgtingslóg um fjarskifti (Fjarskiftislógin).
5.5. Løgtingslóg um matvørur v.m.
5.6. Løgtingslóg um aling av fiski v.m.
5.7. Løgtingslóg um djórasjúkur.
5.8. Løgtingslóg um djóralæknavirksemi v.m.
5.9. Løgtingslóg um djóravælferð (Djóravælferðarlógin).
5.10. Løgtingslóg um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø.
5.11. Løgtingslóg um kapping.
5.12. Løgtingslóg um landsvegir.
5.13. Løgtingslóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál.
5.14. Løgtingslóg um postvirksemi.
5.15. Løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin).
5.16. Anordning om ikrafttræden for Færøerne af årsregnskabsloven (Ársroknskaparlógin).
5.17. Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde.
5.18. Løgtingslóg um vinnu.
5.19. Løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir (Grannskoðaralógin).
5.20. Kunngerð um loðsprógv og loðsfrítøkuskjal v.m.
5.21. Løgtingslóg um tryggingarvirksemi.
5.22. Kunngerð um vápnaprógv.
5.23. Løgtingslóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum.
5.24. Løgtingslóg um kavaravinnu og kavaraútgerð.
5.25. Løgtingslóg um spreingievni og spreingiarbeiði v.m.
5.26. Løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin).
5.27. Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om betalinger.

**6. Yvirlit yvir lóggávu, sum er at rokna sum psykiatrisk sjúklingamál, sbr. § 11, stk. 5.**

6.1. Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om anvendelse af tvang i psykiatrien.

**7. Yvirlit yvir lóggávu, sum er at rokna sum skuldarumskipanarmál, sbr. § 12, stk. 4.**

7.1. Løgtingslóg um umskipan av landsskatta-, mvg, og tollskuld v.m. hjá fólki (Skuldarumskipanarlógin).

8. **Yvirlit yvir lóggávu, sum er at rokna høvuðsbarnaverndarmál, sbr. § 13, stk. 5.**
    8.1. Løgtingslóg um barnavernd (Barnaverndarlógin).

9. **Yvirlit yvir lóggávu, sum er at rokna sum barsilsskipanarsmál, sbr. § 14, stk. 3.**
    9.1. Løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin).

10. **Yvirlit yvir lóggávu, sum er at rokna sum arbeiðsloysisskipanarmál, sbr. § 15, stk. 4.**
    10.1. Løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS-lógin).

11. **Yvirlit yvir lóggávu, sum er at rokna tvingsilsmál, sbr. § 16, stk. 5.**
    11.1. Løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin (Tvingsilslógin).
    11.2. Løgtingslóg um almannatrygd og tænastur.